# Eitt bakkast at seta mvg á bøkur

**Landsstýrismaðurin í mentamálum heldur ikki, at tað er rætt at seta mvg á bøkur**

BØKUR OG MVG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



– Tað ljóðar ikki sum nakað gott hugskot at leggja mvg á bøkur.

Tað heldur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum.

Vit hava spurt hann, hvat hann heldur um tilmælið frá einum arbeiðsbólki hjá fíggjarmálaráðnum um at seta mvg á bøkur sum eitt lið í royndunum at gera mvg lógina einfaldari og greiðari at umsita.

Arbeiðsbólkurin heldur, at tað finst eingin orsøk til at bøkur skulu frítakast fyri mvg. Hetta er ein óbeinleiðis stuðul til bókasølu og mvg lógin er ikki ætlað at vera ein stuðulslóg.

Arbeiðsbólkurin sigur, at bøkur eru ein vanlig vøra, eins og disklar og ljóðbond, har tað er fult mvg.

Í Sosialinum ein dagin í vikuni, mæltu bæði leiðarin á Bòkadeild Lærarafelags og formaðurin í forleggjarafelagnum frá at fylgja tilmælinum.

*– Bøkur eru dýrar sum er, og eg haldi ikki, at tað er rætt at fera tær enn dýrari við at leggja mvg omaná prísin afturat, sum ein arbeiðsbólkur hjá Fíggjarmálaráðnum mælir til, sigur landsstýrismaðurin í mentamálum*

Teir vístu báðir á, at tað fer at gera bøkur dýrari og sostatt fer tað at gera tað verri at geva bøkur út.

## Nóg dýrt sum er

Hesum er landsstýrismaðurin í mentamálum samdur í.

Hann vísur á, at spurningurin um at leggja mvg ábøkur, er als ikki viðgjørdur og enn minni er nøkur avgerð tikin.

Hann er sjálvsagt eisini til reiðar at viðgera spurningin, verður hann lagdur fyri landsstýrið og Løgting til politiska viðferð.

Men í fyrstu atløgu heldur hann ikki, at tað er rætt at leggja mvg á bøkur.

Hann sigur, at tað hevði gjørt bøkur dýrari og tað hevði verið eitt afturstig fyri mentanarpolitikkin.

– Bøkur eru nóg dýrar sum er og eg haldi ikki, at tað er rætt at gera tær dýrari við almennum avgjøldum. Jógvan á Lakjuni sigur eisini, at tað er tungt at geva føroyskar bøkur út, tí marknaðurin er so lítil.

– Verða bøkurnar dýrari við mvg, fer sølan uttan iva at minka, og sostatt fer tað at vera enn truplari at geva føroyskar bøkur út, enn tað longri er.

Hann heldur ikki, at hetta er rætti vegurin at ganga, serliga í hesum døgum, har tað skrivaða orðið er undir sera hørðum trýsti frá sjónvarpi og telduspølum.

– Sum kappingin um børnini og tey ungu er nú, hevur tað tvørturímóti alstóran týudning at stimbra lesihugin og tað gerast ikki við at gera tað truplari at geva bøkur út, sigur landsstýrismaðurin í mentamálum.

# Til gongu úr Hvalba til Sandvíkar

**Í morgin skipar ferðavinnan í Suðuroy fri enn einum gongutúri. Hesuferð gongur leiðin úr Hvalba til Sandvíkar**

FERÐAVINNAN Í SUÐUROY
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tey, sum ikki hava roynt at gingið tað gomlu bygdargøtuna ímillum Sandvík og Hvalba, fáa nú høvi til at royna tað. Og hjá teimum, sum enn minnast, at hendan farleiðin var einasta samband úr Sandvík eftir landi, stendst nú í boðið at vekja gomul minni aftur

Í morgin skipar ferðavinnan í Suðuroy nevniligafyri gonguferð úr Hvalba til Sandvíkar eftir teirri gomlu bygdargøtuni, upp um fjallið.

Og tað eru sjálvsagt mong, sum enn minnast tíðina, tá í henda farleiðin var álitið hjá sandvíkingum, tí tað eru ikki meiri enn 24 ár síðani, at Sandvík fekk vegasamband við "umheimin" gjøgnum tunnilin.

Bussur koyrir av Kunningarstovuni í Gamla Skúla í Vági klokkan 10 í morgin árini og av Kunningarstovuni á Tvøroyri kl. 10.30.

Gongutúrurin byrjar í Giljum, haðani gingið verður niðan á Heiðarnar og síðani niðan á Eggina. Síðani verður farið niður í Ovara dal og oman í Niðara Dal. Nú koma vit oman á slætt við Steinin við Vaðið. Fara so eftir Mýravegnum og inn í Bø.

Staðkend heimildarfólk eru við á túrinum.

## Síggja bygdarsavnið

Í Sandvík er eitt bygdarsavn, sum høvið eisini verður at vitja. Tað eru hálvtannaðhundrað ára gomlu Bóndahúsini Uttan Ánna, sum eru partur av gomlu bygdasøguni í Sandvík og ein dýrgripur fyri bygdina.

Aftaná gongutúrin verður farið at síggja gomlu húsini og tað sum inni og har verður eisini ein heitur munnur at fáa við onkrum góðum afturvið. Drekkamunnur og at síggja bóndahúsini kostar 50 krónur.

Eftir loknan túr verður farið aftur við bussi úr Sandvík til ávikavist Kunningarstovurnar á Tvøroyri og í Vági.

Kostnaður fyri gongutúrin og busskoyring er 100 krónur fyri vaksin, men hjá børnum er tað ókeypis.

Bindandi tilmelding skal gerast á kunningarstovuni í Vági á tlf. 374342 ella á 284342 ella á kunningarstovuni á Tvøroyri tlf. 372480 ella á 284480 í seinasta lagi fríggjadagin 16.00.

Hetta er næstseinasti gonguferðin, sum ferðavinnan í Suðuroy skipar fyri í ár eftir teimum gomlu varðagøtunum. Seinasti túrurin verður næsta leygardag og hann verður úr Øravík til Vágs.



*Seinasta leygardag skipaði ferðavinnan í Suðuroy fyri gonguferð av Hestinum, í Kjøtholuna, oman í Kasparsholu og oman í Akraberg. Fleiri børn um skúlaaldur vóru við túrinum*



# Fyrireika handilsmiðstøð í Vágum

**Ein arbeiðsbólkur arbeiðir við ætlanum um at byggja ein stóra handilsmiðstøð í Miðvági. Ætlanin er at savna handlar og tænastufyritøkur bæði úr Vágum og av oynni**

HANDILSMIÐSTØÐ
*Edvard Joensen*



*Arbeitt verður við at byggja eina handilsmiðstøð á økinum norðan fyri kirkjugarðin í Miðvági fremst á myndini*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:**
Arbeitt verður við at byggja eina handilsmiðstøð norðalaga í Miðvági. Økið, sum játtan er fingin um, liggur norðan fyri kirkjugarðin yvir av Føroya Keypssamtøku.

Ein av stigtakarunum, Heðin Poulsen á Vatnsoyra Snikkaravirki, sum saman við Odmari Ravnsfjall og Rólanti Haraldsen í Miðvági, arbeiðir við hugskotinum, sigur, at ætlanin er at savna handlar og skrivstovur, sum hava nógva avgreiðslu í hesi miðstøðini og á tann hátt kunna geva fólki so góða tænastu, sum til ber. Hugsað er eisini um at fáa serhandlar at húsast í bygninginum, soleiðis at hesir kunnu vera við til at draga fólk til oynna, sum hann tekur til.

Kunningarskriv eru send handilsfólki í Vágum fyri líkasum at lodda dýpið, siga fyrireikararnir. Og afturmeldingarnar tykjast sum heild positivar. Hetta hugskotið at fara til Miðvágs er ikki tað fyrsta av hesum slagnum. Fyrr hevur verið roynt at sleppa nærindis flogvøllinum við einum slíkum bygningi, men tað tóktist ov tungt at koma ígjøgnum, tí og nógvir »instansir« vóru at fara ígjøgnum har. Nú tykist líkasum lættari at koma í gongd, og tilsøgn um lendi er fingin frá Miðvágs Kommunu, sigur Heðin Poulsen, sum vegna Vatnsoyra Snikkaravirki er við í ætlanini.

Heðin Poulsen sigur,at fyrireikararnir halda, at handilslívið í Vágum hevur gott av eini slíkari ætlan, tí sum er, liggja handlarnir sera spjaddir kring í oynni.

# Vinnulóggáva frá kreppuárunum skal endurskoðast

**Vinnumálaráðharrin vil endurskoða føroyskan vinnupolitikk íroknað vinnuliga lóggávu, við sikti at mótsvara ES stigi í eitt nú roknskaparlóg og partafelagslóg**

VINNUPOLITIKKUR
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*



Vit skulu endurskoða vinnupolitikkin, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sum herfyri legði eitt upprit um hendan spurning fyri landsstýrisfund í Tinganesi. Innihaldið í uppritinum er enn ikki alment, líka so lítið sum tann politiska viðgerðin er komin nakað áleiðis. Men sum skilst er breið semja um tær stóru linjurnar.

Bakgrundin kann millum annað síggjast í at grannskoðarar og onnur hava víst á at tann føroyska roknskaparlógin hvørki livir upp til ein veruligan virðisbrævamarknað ella gevur legalar karmar ið attrahera altjóða íleggjarar.

Ein endurskoðan av vinnupolitikkinum má, meir ella minni sum ein sjálvfygja, gera upp partar av tí lóggávu sum varð smíðjað oman yvir okkum tað svarta árið 1992. Júst hvørjir partar ið verða endurskoðaðir, vildi vinnumálaráðharrin ikki siga serliga nógv um; men hann indikeraði nakað um roknskaparlóg, partafelagslóg, skatta- og avgjaldslógir og so vinnuframa skipanir.

*– Ein endurskoðan av vinnupolitikkinum má meir ella minni sum ein sjálvfygja gera upp partar av tí lóggávu, sum varð smíðjað oman yvir okkum tað svarta árið 1992, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum*

»Í altjóða samhandli er tað grundleggjandi at hava framkomna lóggávu,« segði Bjarni Djurholm. »Tað er eingin ivi um at vit mugu dagføra okkara roknskaparlóg og partafelagslóg umframt hyggja nærri at okkara skatta- og avgjaldslóggávu. Vit mugu gera nýggjar metingar av hvørjar leiðbeiningar skulu galda fyri vinnuframa skipanir so sum Ferðaráðið og Menningarstovan, og vit mugu orða ein greiðan og ítøkiligan vinnupolitikk… Vit mugu geva týðiligari signal um hvussu vit ynskja at menna vinnuna sum heild.«

*Skulu vit hava eina enn meira politiseraða vinnu?*

»Nei. Breið semja er um at vit skulu ikki hava politiska uppílegging í vinnuna, hóast okkara vinnutól í óvanliga stóran mun eru ogn hjá tí almenna. Vit skulu rætta okkum eftir nútíðini og tað merkir sum oftast, fyri okkara viðkomandi, ES standardir. Tað nógva av okkara vinnulóggávu stavar frá lidnum loysnum uttanifrá í sambandi við kreppuna í 1990-unum; nú er tíð uppá at vit sjálv fara undir at leggja nakrar linjur og orða nakrar setningar.«

*Ætla tit bara at kopiera danskar reglur?*

»Nú er jú Danmark partur av ES… Danskar reglur kunnu tí eisini brúkast sum fyrimynd í tann mun tær hóska til okkara viðurskifti. Vit skulu jú eisini hugsa um tað praktiska arbeiðið í at smíða lógir, tað tekur nógva tíð og orku, og vit kunnu hava fyrimunir av at taka til okkum lógir frá dønum so væl sum øðrum.«

Summa summarum er tað enn rættiliga ógreitt hvat ítøkiligt vit skulu vænta okkum. Men tað verður so ikki ein hækking av skatti fyri vinnuna, segði Bjarni Djurholm.

»Nú skulu vit millum annað hoyra bæði Fíggjarmálaráðið og Fiskimálaráðið í sambandi við partar av hesari endurskoðan, men tað tori eg at siga rættiliga hart, her er ikki upp á tal at økja skattir.«

Sum skilst skal ein arbeiðsbólkur við luttøku av vinnumálaráðnum og fólki uttanifrá setast fyrsta dagin at gera eitt upplegg til næsta ár.